## Ikki so ringir kortini

Forsetin í Venesuela, Hugo Chavez, hevur sínar egnu áskoðanir um mangt og hvat, og hann aftrar seg ikki við at siga, hvat hann heldur um ymiskt. Nú vil hann vera við, at Robert Mugabe og Mahmoud Ahmadinejad eru ikki so ringir, sum sagt verður, og tað sama sigur hann um fyrrverandu ugandiska einaræðisharran Idi Amin. Í einari røðu um vikuskiftið umrøddi venesuelski forsetin Mugabe og Ahmadinejad sum sínar brøður, og hann helt Idi Amin vera fosturlandsvin. Idi Amin stýrdi Uganda í átta ár í sjeytiárunum, og hesi árini vórðu umleið 300.000 fólk har fyribeind.



## Mótmæli í Kina

Um vikuskiftið kravdi ein námsvanlukka har norðuri í Kina 104 mannalív, og í morgun gingu avvarandi hjá teimum, sum doyðu, mótmælisgongu, har tey funnust hvassliga at teirri vánaligu trygdini í námunum. Útlendsku tíðindastovurnar skriva, at løgreglumenn og trygdarmenn royndu at steðga mótmælisgonguni, og at partarnir brustu saman. Námsvanlukkur eru rættiliga vanligar í Kina, men vanlukkan um vikuskiftið var tann ringasta í tvey ár. Sambært almennum upplýsingum hava 3.200 kinesiskir námsarbeiðsmenn latið lív í vanlukkum tað seinasta árið, men óheftar keldur siga, at tað veruliga talið er nógv størri.

# Matstovur sleppa undan MVG

**Eitt av uppskotinum í vakstrarpakkanum hjá Vinnumálaráðnum er at taka av MVG í matstovuvinnuni, ella lækka tað til fimm prosent**

VAKSTRARPAKKI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í átakinum, sum í vakstrarpakkanum hevur fingið heitið »Lækka sølu-MVG fyri mat á matstovu- og cateringvirksemi«, sigur Vinnumálaráðið, at matstovuvinnan hevur sera truplar karmar at virka undir í Føroyum í mun til grannalondini og eisini í mun til aðrar føroyskar vinnur. M. a. hevur vinnan bert avmarkaðar møguleikar at forvinna pening upp á sølu av drekkavørum, orsakað av almenna monopolinum upp á innflutning og sølu av víni og øli og teimum almennu avgjøldum, sum verða løgd á vín og øl. Sostatt eru truplu karmarnir í stóran mun skaptir við almennari regulering, hóast ætlanin við ásetingunum í rúsdrekkalógini neyvan hevur verið at leggja fótonglar fyri matstovuvinnuna.

Harumframt er sølu-MVG munandi hægri í Føroyum enn í flestu ES-londum, sum vit kappast við innan ferðavinnu. ES-nevndin hevur góðkent, at limalondini frá 1. juli 2009 kunnu lækka sølu- MVG á matstovu- og cateringvirksemi til í minsta lagi 5 %. Frakland hevur sum fyrsta limalandið nýtt henda møguleika og hevur lækkað MVG'ið á matstovuvirksemi til 5,5%. Í Íslandi er MVG'ið á matstovum 7%. Í bæði Fraklandi og Íslandi er valt ikki at lækka MVG á drekkavørum, ið innihalda alkohol.

Í átakinum verður grundgivið við, at ein vælvirkandi matstovuvinna er ein fortreyt fyri at menna eina røð av øðrum tænastuveitingum. Matstovuvinnan hevur eisini ein avgerandi leiklut í ferðavinnuni, bæði tá tað snýr seg um privat ferðafólk og onnur, sum koma til landið í arbeiðsørindum t. d. í sambandi við ráðstevnum. Harafturat er ein fjøltáttað og vælvirkandi matstovuvinna ein grundleggjandi karmur, tá tað snýr seg um trivnaðin hjá fólki - og nakað sum fólk taka við í metingina, tá avgerð skal takast um at búseta seg í Føroyum ella uttanlands.

Ymiskir møguleikar eru at bøta um karmarnar hjá matstovuvinnuni. Tað er tó ikki sannlíkt, at broytingar verða gjørdar í avgjøldunum á víni og øli, ella at matstovurnar sjálvar fáa møguleika at innflyta vín og øl. Í staðin er neyðugt at kompensera fyri hesa skeikling av marknaðinum á annan hátt. Skotið verður tí upp, at sølu-MVG fyri tilgjørdar máltíðir verður sett niður á 5%, sum er minstamarkið í ES, ella betur verður sett niður á 0 fyri at varðveita greidleikan í MVG-lógini. MVG-frítøkan skal ikki fevna um drekkavørur. Í fyrstu atløgu fer hetta sannlíkt at minka um MVG-inntøkurnar hjá landskassanum, men við tíðini er sannlíkt, at hetta kann føra til økt virksemi innan matstovu- og ferðavinnuna. Sum dømi kann nevnast, at um 100 fólk, sum annars høvdu verið arbeiðsleys ella flutt av landinum, í staðin fáa arbeiði í matstovuvinnuni, kann hetta átakið nærum gerast útreiðsluneutralt fyri landskassan. Um ferðavinnan veruliga tekur dik á seg, kunnu MVG-inntøkurnar hjá landskassanum vaksa í mun til í dag.

Av tí at nevy hagtøl ikki eru, er ilt at meta um kostnaðin. Men í Vinnumálaráðnum meta tey, at tað kostar einar 15 milliónir krónur fyrsta árið. Við tíðini er sannlíkt, at hetta kann føra til økt virksemi innan matstovu- og ferðavinnuna og harvið økja inntøkur landskassans nakað.

Tíðarætlanin er, at lógaruppskot verður lagt fyri Løgtingið í hesari tingsetuni.

Til ber hjá fólki at gera viðmerkingar til átøkini á heimasíðuni hjá Vinnumálaráðnum www.vmr.fo



*Roknað verður við, at tað fer at kosta einar 15 millliónir fyrsta árið at frítaka matstovur fyri MVG - men at tað sum frá líður fer at hvíla í sær sjálvum*

# Hjálpa tryggingarfeløgum at fara uttanlands

**Eitt átak í vakstrarpakkanum hjá Vinnumálaráðnum er at gera tvíliðaðar sáttmálar við Danmark, Norðurlond og Ongland innan tryggingarøkið**

VAKSTRARPAKKI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Vinnumálaráðið sigur, at sum støðan er í dag, eru forðingar fyri, at føroysk tryggingarfeløg kunnu bjóða seg fram uttan fyri Føroyar og Ísland. Hetta viðførir, at tað er trupult hjá tryggingarfeløgunum at vaksa av tí, at føroyski tryggingarmarknaðurin er mettaður á fleiri økjum.

Við nýggju tryggingarlógini frá 2008 er føroyska tryggingarlóggávan sum heild í samsvari við tryggingarlóggávuna í grannalondunum og í ES. Áðrenn føroysk tryggingarfeløg kunnu bjóða seg fram uttanlands, er kravið tó, at tvíliðað avtala verður gjørd við landið, har ætlanin er at bjóða seg fram. Í løtuni finst bert ein slík avtala við Ísland, men tingingar eru eisini við Danmark um sínámillum avtalu innan tryggingarøkið. Í fyrsta umfari er ætlanin eisini at gera tvíliðaðar sáttmálar við onnur Norðurlond og Ongland, so føroysk tryggingarfeløg í veruligan mun kunnu bjóða tryggingar fram uttan fyri Føroyar-Ísland.

Átakið snýr seg í fyrstu syftu at gera sínamillum avtalu við Danmark og síðani við onnur Norðurlond og við Ongland innan tryggingarøkið. Mett verður, at útreiðslurnar verða fíggjaðar av verandi játtanum.

Sambært tíðarætlanini skal avtala við Danmark undirskrivast fyrst í komandi ári, og avtala gjørd við hini londini í 2011.

Til ber hjá fólki at gera viðmerkingar á heimasíðuni hjá Vinnumálaráðnum www.vmr.fo

